UTTAN ÚR HEIMI

## Hjálparfólk myrd

Í Afghanistan hava uppreistrarmenn hjá Taliban beint fyri fimm fólkum, sum arbeiddu við at útvegha fólki heilivág og aðra neyðhjálp.

Talan var um tveir læknar, tvær sjúkrasystrar og bilførara teirra. Tey vóru við í einum hjálpar- og menningarátaki, sum privatar fyritøkur hava fíggjað. Taliban hevur fyrr lýst heilagt kríggj ímóti hjálparfelagsskapunum, sum virka í Afghanistan, og ST sigur, at uppreistrarmenninir hava beint fyri fleiri tíggjutals hjálparfólkum, síðani Taliban varð rikið frá valdinum fyri fýra árum síðani. Talan er bæði um afghanar og útlendingar.

Tíðindini um tað seinasta álopið av hesum slagnum komu, júst sum afghanski forsetin, Hamid Karzai, hevði havt fund við amerikanska uttanríkisráðharran, Condoleezza Rice, sum var í Kabul mikudagin.

## Rent trúboðarar av landinum

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, hevur gjørt av at koyra trúboðararnar hjá felagsskapinum The New Tribes Mission av landinum.

Chavez vil vera við, at trúboðararnir fáast við annað enn at kunna indiánarnar um ta kristnu trúnna. Hann sigur virksemi teirra vera eitt slag av amerikonskum hjálandapolitikki, og slíkum hevur Venesuela havt nóg mikið av, sigur Chavez. Hann vil vera við, at trúboðararnir hava bygt sær sjálvum marglætishús beint við tær fátæku indiánarabygdirnar, og at trúboðararnir ferðast til og úr Venesuela uttan um alt eftirlit, tí teir brúka privat flogfør.

The New Tribes Mission arbeiðir í seytjan londum í Latínamerika, Landssynningsasia og Vesturafrika. Felagsskapurin hevur serliga lagt seg eftir at boða kristindómin í fjarskotnum økjum.

## Hótta ST við atsókn

ST hevur gjørt av at styrkja vaktarhaldið kring skrivstovurnar, sum heimsfelagsskapurin hevur í Genéve. Talan er um høvuðsskrivstovuna Palais de Nations og skrivstovurnar hjá heimsheilsustovninum WHO, altjóða arbeiðarafelagsskapinum ILO og flóttafólkaráðnum.

Sambært tíðindastovuni AP er hetta ikki fyrstu ferð, at ST hevur fingið hóttanir um atsóknir at skrivstovunum í Genéve, men hinvegin er tað fyrstu ferð, at ST hevur valt at styrkja vaktarhaldið kring skrivstovurnar. Tí verður hildið, at ST tekur ta seinastu hóttanina í stórum álvara.

Ein talskvinna hjá ST segði í gjár, at leiðslan samstarvar við teir sveisisku myndugleikarnar um trygdina, men hon vildi einki siga um sjálva hóttanina. Fyribils verður vaktarhaldið styrkt, og strangari eftirlit verður við øllum, sum hava ørindi á skrivstovunum. Vørur, sum skrivstovurnar keypa, skulu kannast gjølla, og soleiðis verður eisini við øllum bilum, sum skulu inn á økini hjá skrivstovunum, skrivar AP.

## Vilja hava fleiri vindmyllur

Norska orkufelagið Statkraft og oljufelagið Shell eru til reiðar at brúka fleiri milliónir krónur til eina verkætlan, sum skal hava við sær, at fleiri vindmyllur verða settar upp á grunnum vatni fram við norsku strondini.

Ætlanin er at menna nýggjar vindmyllur, og sambært Bergens Tidende er ætlanin at brúka slakar tíggju milliónir krónur til verkætlanina í fyrsta umfari.

Í Danmark, Svøríki og Bretlandi er tað vorðið vanligt at seta vindmyllur á grunnum vatni fram við strondini, men avbjóðingarnar eru heldur størri við ta norsku strondina, tí har er meiri vindur og størri alda, skrivar Bergens Tidende. Kortini verður hildið, at vindmyllur á sjónum kunnu gerast eitt munagott ískoyti til tað norska orkukervið, skrivar blaðið.

# Bardagar í russiskum býi

**Umleið 150 vápnaðir menn lupu í gjár á býin Naltjik har suðuri í Russlandi**

ÁLOP
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrapartin í gjár dundu skotini í suðurrussiska býnum Naltjik. Sambært myndugleikunum vóru umleið 150 vápnaðir menn komnir inn í býin, har teir søktu at einari løgreglustøð, einum skúla og fleiri øðrum almennum bygningum.

Sambært tíðindastovuni Interfax hevði onkur boðað myndugleikunum frá frammanundan, og tað gjørdi, at tað eydnaðist at fáa børnini úr skúlanum, áðrenn álopsmenninir komu hagar.

Løtu seinni komu fleiri hernaðarakfør inn í býin, og so kyknaðu harðir bardagar ímillum álopsmenninar øðrumegin og hermenn og løgreglumenn hinumegin. Stutt fyri middag kunngjørdi Interfax frá almennum keldum, at minst 50 álopsmenn og tólv sivilfólk høvdu latið lív. Meiri enn 60 sivilfólk vórðu særd. Eisini ljóðaði, at álopsmenninir høvdu tikið nakrar løgreglumenn gíslar.

Russisku myndugleikarnir søgdu seg vera sannførdar um, at tað vóru uppreistrarmenn úr Kekenia, sum skipaðu fyri álopinum, men aðrar keldur vildu vera við, at bardagarnir byrjaðu, tá løgreglan handtók fleiri víðgongdar muslimar.

Naltjik er í lýðveldinum Kabardino-Balkaria, sum er stutt frá Kekenia. Næstan helmingurin av fólkinum eru karbadar, sum eru kaukasar. Umleið 13 prosent eru balkarar, sum er eitt turkiskt fólk. Bæði karbadararnir og balkarararnir eru muslimar. Umleið 32 prosent av fólkinum í Kabardino-Balkaria eru russar.

# So er fuglakrímið komið til Evropa



*Mynd: Reuters*

**ES váttaði í gjár, at fuglakrím er staðfest í Rumenia**

FUGLAKRÍM
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tríggir serfrøðingar, sum ES sendi til Rumenia fyrr í vikuni at kanna illgruna um fuglakrím, boðaðu í gjár frá, at teir høvdu staðfest ta herviligu sjúkuna hjá einum høsnarunga og einari dunnu á einum garði tætt við Donau-ósan.

So seint sum mikudagin boðaði ES annars frá, at talan var ikki um fuglakrím, men teir rumensku myndugleikarnir gjørdu kortini av at beina fyri fleiri túsund fuglum í bygdini Ceamurlia de Jos.

Serfrøðingar siga tað vera óheppið, at fuglakrímið er staðfest í Donau-ósanum, tí nógvir flytifuglar steðga á júst har. Tí er smittuvandin størri, enn hann annars hevði verið.

Fuglakrím hevur kravt 69 mannalív í Asia higartil í ár, og serfrøðingar hjá heimsheilsustovninum WHO bera ótta fyri, at virusið kann broytast, so tað smittar ímillum fólk. Hendir tað, kann sjúkan breiða seg um allan heimin, siga teir.